# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Borgarstjórin í Klaksvík umhugsar støðuna í Tjóðveldisflokkinum

**Herfyri tók Karsten Hansen seg úr Tjóðveldisflokkinum, og nú umhugsar Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, at gera tað sama**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

- Eg umhugsi alvorliga støðuna, tí eg eri ikki nøgdur við hana, sum hon er nú. Eg havi ikki tikið støðu enn, men tað verður um ikki so langa tíð, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, um sín limaskap í Tjóðveldisflokkinum.

Herfyri tók næstformaðurin í flokkinum, Karsten Hansen, seg úr Tjóðveldisflokkinum, av tí at allir hinir tinglimir floksins atkvøddu fyri broytingini í §266b í revsilógini, so samkynd verða vard ímóti diskriminatión, og tað hóvaði honum ikki.

Partamaður hansara í Norðoyggjum, Steinbjørn O. Jacobsen, er samdur við hann.

**Hugburðurin øðrvísi í Suðurstreymoy**

- Tað er fallið mær fyri bróstið, at Tjóðveldisflokkurin í sambandi við lógasmíð, ikki vil hava Bíbliuna sum rættisnór, sigur Steinbjørn O.Jacobsen, ið tó leggur afturat, at hann ongan veg er farin enn.

Hann hevur heldur ikki tikið støðu til, um hann møguliga ætlar upp í annan flokk ella upp í landspolitikk.

- Eg havi tvey ár eftir sum borgarstjóri, sigur hann.

Steinbjørn O. Jacobsen metir annars, at hugburðurin mótvegis eitt nú málum sum 266b er heldur øðrvísi í t.d. Norðoyggjum og Sandoynni enn í Suðurstreymoy, har fleiri fólk búgva.



*Steinbjørn O. Jacobsen er ikki nøgdur við Tjóðveldisflokkin*

# Fríðborg í ógvusligum ódnarveðri



*Hóast nógv er oyðilagt umborð, megnar Fríðborg at sigla til lands og verður væntandi í Føroyum í morgin*

**Eingin av manningini fekk skaða, tá Fríðborg hóskvøldið fekk ein sjógv, sum breyt einar fimm rútar og oyðilegði elútgerðina og tað mesta av brúnni**

FISKIVINNA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Tummas Justinussen, reiðari, sigur, at veðrið var so vánaligt, at eingin kundi koma og hjálpa Fríðborg, og tí løgu teir einsamallir í einar 18 tímar, til Havborg kom teimum til hjálpar.

Fríðborg hevði júst verið og landað í Íslandi. Teir vóru staddir nakað suður úr Kappanum á veg til Grand Bank, tá sjógvurin forðaði fyri, at fiskiskapurin kundi halda fram.

Havborg er nú farin aftur til fiskiskap, og Fríðborg er á veg til Føroya, her teir væntandi verða týsdagin.




MÓTTØKULEIÐARI TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir móttøkuleiðara til Norrönu at byrja skjótast gjørligt

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi starv, sum móttøkuleiðari í einum altjóða umhvørvi, har lyklaorðini eru:

- Ábyrgd
- Persónlig avbjóðing
- Dygd
- Faklig menning
- Persónlig menning

Smyril Line sóknast eftir fólki við receptionist útbúgving og gjarna roynd sum leiðari. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni, góðan teldukunnskap og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvir litið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst (ikki eldri enn 2 ár).**

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (ikki eldri enn 5 ár).

Løn og setanartreytir eru smb. galdandi sáttmála undir FAS-skipanini við Føroya Fiskimannafelag. Størvini verða sett skjótast gjørligt.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til aðra av hesum tilskriftum áðrenn 15. januar 2007:

crew@smyril-line.fo
hotel.manager@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM